# Fáar atkvøður á muni

**Jarvin Feilberg Hansen kann nú fara undir sítt triðja skeið sum formaður í Føroya Pedagogfelagi. Leygardagin vann hann tepurt á avbjóðara sínum**

FAKFELAG
*Snorri Brend*
*Myndir: Ólavur Frederiksen*



*Pedagogarnir møttu væl upp til aðalfundin*

**Pedagogar:** 16 atkvøður!!

Tað var munurin millum verandi formann og Maud Vang Hansen, sum var mótvalevnið til hetta starvið.

Felagið hevði aðalfund leygardagin, og her varð stríðsval um formanspostin, tí ein av nevndarlimunum sitllaði upp ímóti formanninum.

Tá atkvøðurnar vórðu taldar upp fekk Jarvin Feilberg Hansen 179, meðan Maud Vang Hansen fekk 163 – tað er: 16 færri.

Hinvegin kann ein staðfesta, at 17 atkvøður vóru blankar, og vóru tað á ein hátt hesar sum avgjørdu valið.

### Rokkin mál

Frammanundan aðalfundinum vísti afturvaldi formaðurin á, Pedagogfelagið var í eini positivari tilgongd.

- Á fleiri økjum síggja vit ítøkilig úrslit av málum, sum vit hava arbeitt við í longri tíð, vísti hann á. – Hetta sæst ikki minst aftur í, at vit hava fingið fakfelagssamstarvið í fastar karmar.

Jarvin vísti haraftrat á, at tey kunnu eisini taka fult og heilt undir við mongum av teimum málum, sum samgongan borðreiðir við í samgonguskjalinum.

- Hetta eru alt mál, sum vit leingi hava virkað fyri, og sum nú tykjast at vera sett ovast á politiska breddan.

- Eingin ivi skal vera um, at stendur landsstýrið við sín setning, skal okkara partur, í einum neyvum samstarvi við avvarðandi politiskar myndugleikar, ikki liggja eftir, sigur Jarvin Feilberg Hansen, sum nú fer undir sítt triðja skeið sum formaður í Pedagogfelagnum.



*Jarvin Feilberg Hansen varð afturvaldur til sítt triðja skeið*



*Maud Vang Hansen var bert fáar atkvøður frá at koppa verandi formanni*

---

# 5,7 prosent í lønarhækking

**Starvsmannafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag skrivaðu gjáramorgunin undir nýggjan sáttmála fyri starvsfólkini hjá Postverki Føroya**

SEMJA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Postverkið**: Starvsfólkini fáa 5,7 prosent í lønarhækking og 2 prosent oman á eftirlønina

Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum segði eftir samráðingarnar, at hon var væl nøgd við nýggja sáttmálan.

Hon viðgekk kortini fyri útvarpinum, at tey ikki fingu tað, tey fóru eftir – sum var ein lønarhækking í sáttmálaskeiðinum upp á 10 prosent.

- Virði á semjuni er kortini um 8,5 prosent, og tað eru vit væl nøgd við, segði Selma Ellingsgaard.

Lønin hjá starvsfólkunum hjá Posteverki Føroya hækkar við 5,7 prosentum frá 1. oktober í fjør at rokna, meðan eftirlønin hækkar tvey prosent frá 1. januar í ár. Sáttmálaskeiðið gongur til 1. januar í 2010.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er eisini nøgt við semjuna. Ester Dahl frá Vinnuhúsinum vísti á, at tey hava eisini fingið broytt ymsar orðingar, har leiðslurætturin varð skerdur.

Eitt dømi um hetta er forðingin hjá leiðsluni í postverkinum sum førdi við sær, at hon hevði ikki rætt at seta ávís størv. Hetta er nú broytt, soleiðis at leiðslan lættari fær sett fólk í starv.

Sum heild eru tey í Vinnuhúsinum eisini væl nøgd við semjuna.



*Samráðingarnar endaðu sunnumorgunin við eini semju, sum báðir partar eru nøgdir við*
*Mynd: Ólavur Frederiksen*